Hetlendingar víðka sjónarringin:

# Nýggja Norröna kveikir lív í norrønu røturnar

**Íløgan í nýggju Norrönu ger, at hetlendingar fyri fyrstu ferð sjálvir hava ávirkan á flutningssambandinum við útheimin. Verandi sigling millum oyggjarnar og Aberdeen er ruta, sum hetlendingar sum so onga ávirkan hava á. Hetta er sera kostnaðarmikil flutningur. Við at seta pengar í Norrönu hava hetlendingar brádliga sjálvir fingið møguleika at ávirka flutningsmynstrið t.v.s. bæði fyri farm og ferðafólk.**

TÆTTARI SAMSTARV

*Jan Müller*

Millum tey ferðandi við Norrönu fyrsta túrin úr Hetlandi til Føroya nú um dagarnar var eisini Hans J. Marter, blaðmaður. Hann er týskari men setti seg niður í Hetlandi fyri góðum 10 árum síðani saman við unnustu síni úr Eysturríki. Í dag rekur hann eina tíðindastovu har, ið nevnist »Shetland News Agency«. Haraftrat gevur hann út mánaðarligt blað »Shetland Post«, sum serliga fer afturum evni og viðger tey meira nágreiniliga. Eisini er hann tíðindamaður hjá skotska blaðnum Press and Journal umframt hjá Grampian TV.

Hans Marter er ræettiliga krittiskur í sínum journalistikki og hann heldur fyri, at stóra hetlendska íløgan í Norrönu er ein politisk íløga heldur enn ein handilslig. Hann er eitt sindur ivasamur og er tað so sum einki løgið í tí. Tí í Hetlandi eru tey so von við, at myndugleikarnir brúka av avkastinum frá mongu oljugrunnunum til endamál, sum ikki endiliga geva nakað av sær. Hinvegin dylur hann heldur ikki fyri, at møguliga er hugburðurin hjá tí vanliga hetlendingunum til slíkar íløgur broyttur, nú tey síggja stóru og nýggju Norrönu koma inn til Lerwick. Nú síggja tey bráddliga, at oljupengarnir eru við til at skapa nakað nýtt og veruligt, nakað, sum kann fara at hava positivar avleiðingar fyri teirra egna oyggjasamfelag.

Tá hugsað verður um teir nógvu pengarnar, sum eru í ymsu oljugrunnunum í Hetlandi, so kunnu 50 mill. kr. tykjast lítið. Hinvegin er eisini at siga, at hetlendingar hava dyggiliga brent seg við at seta oljupengarnar í partabrøv. Hans Marter vísir á, at stóra afturgongdin á partabrævamarknaðunum í seinastuni hevur eisini merkt oljugrunnarnar nógv. Eitt nú minkaði ein av grunnunum úr 350 mill. pundum niður í 150 mill. pund. Hetta kemur illa við hjá teimum mongu, sum »liva« av avkastinum, sum annars er í góðum tíðum. Vanligt hevur verið at lata part av avkastinum av pengunum til ymisk vælgerandi og onnur endamál og eitt nú sum subsidiur til vinnulig endamál eisini.

Hans Marter hevur ikki verið í Føroyum áður. Hann gjørdist rættiliga ovfarin av at síggja, hvussu nógv litfægrari tað er her enn í Hetlandi, har tað mangan er grátt yvir grátt. Eitt er at húsini eru grá men haraftrat liggur mjørkin oftani tjúkkur um oyggjarnar.

Hóast hann er varin við at úttala seg um, hvønn týdning íløgan í Norrönu kann fáa fyri Hetland, so sær Hans Marter tó møguleikar her, sum í framtíðini kunnu gagna Hetlandi og eisini samvinnuni millum oyggjasamfeløgini í Norðuratlantshavi.

Framvegis eru hetlendingar vitandi um sínar norrønu røtur, tó at »skotiseringin« av tí líla oyggjasamfelagnum er so sjónsk og djúp. Hesi seinastu 20 árini við nógvari olju hava eisini havt sína stóru ávirkan. Nógv fólk eru flutt av meginlandinum til Hetlands og hevur tað broytt samfelagið nógv.

Íløgan í nýggju Norrönu ger, at hetlendingar fyri fyrstu ferð sjálvir hava ávirkan á flutningssambandinum við útheimin. Verandi sigling millum oyggjarnar og Aberdeen er ruta, sum hetlendingar sum so onga ávirkan hava á. Hetta er sera kostnaðarmikil flutningur. Við at seta pengar í Norrönu hava hetlendingar brádliga sjálvir fingið møguleika at ávirka flutningsmynstrið t.v.s. bæði fyri farm og ferðafólk. Nú ber til at flyta eitt nú aldan fiskin við Norrönu til Danmarkar, nú er eisini latið upp fyri møguleikanum at fáa danir, norðmenn, føroyingar og íslendingar og onnur við at ferðast til Hetlands uttan at skula við rutubátunum úr Aberdeen.

Og nú ber til hjá hetlendingar sjálvum at ferðast í onnur lond uttan at skula vera bundin av at ferðast til Aberdeen.

Hvat fiskaútflutningi viðvíkur so heldur Hans Marter, at tað fer helst at taka sína tíð at byggja upp henda nýggjan flutningsmøguleikan, men uppá longri sikt kann tað vera gagnligt fyri Hetland at hava henda møguleikan.

## Oljan týdning í framtíðini

Hans Marter sær eisini møguleikar fyri øktari samvinnu og flutningi millum Hetland og Føroyar, um oljuvinna tekur seg upp í Føroyum. Hóast oljuvinnan í Hetlandi er uppá retur, eitt nú fækka arbeiðsplássini á so týðandi oljustøðum sum Sullom Voe, so eru tó framvegis vónir um at gera nýggj oljufund millum Hetland og Føroyar.

Í hesum sambandi arbeiðir eitt nú BP í løtuni við at menna infrastrukturin í økinum. Frá 1. juli í ár fer felagið at leggja eina sera stóra rørleiðing frá Sullom Voe oljuterminalinum til Clairfeltið, sum liggur nakað vestan fyri. Hetta stig hevur samband við at farið er undir at útbyggja ein part av tí risastóra Clairfeltinum til at kunna byrja framleiðslu í 2004. Henda rørleiðingin ger, at tað slepst undan at flyta oljuna við stórum tangaskipum eins og gjørt verður frá hinum báðum oljufeltunum, Schiehallion og Foinaven. Sum so er nýggja rørleiðingin, sum verður løgd á botnin við tí risastóra Solitaire-rørleggingarskipinum, eitt nýtt og spennandi stig at menna oljuøkini millum Føroyar og Hetland.

Tað vísir seg, at rørini, sum verða løgd á havbotnin eru sera stór og hevur hetta helst nakað við framtíðina at gera eisini. Hugsast kann at man frá oljufeløgunu m vil tryggja sær at hava eina rørleiðing, sum kann bindast í aðrar oljukeldur á Atlantsmótinum eisini. Hugsast kann at man vil leggja rørleiðingar víðari vestur og suðureftir seinni og harvið fáa alla oljuna á Atlantsmótinum til lands gjøgnum rørleiðingar heldur enn at brúka kostnaðarmikil tangaskip. Eisini minkar tað um dálkingarvandan.

Hans Marter, sum hevur fylgt oljutilgongdini í Hetlandi øll hesi seinastu árini, sær stórar møguleikar í hesi nýggju rørleiðing, eisini fyri føroyingar, um so er at olja verður funnin við Føroyar og man helst ikki sær, at oljan verður flutt í land í Føroyum men heldur vil lata hana fara til eitt nú Sullom Voe í Hetlandi.

Ætlanin er at flyta umleið 500.000 tunnur av olju frá Clairfeltinum um rørleiðingina til Sullom Voe um samdøgrið.



Hans Marter, hetlendskur tíðindamaður sær stórar møguleikar í framtíðini í nýggja flutningssambandinum. Spurningurin er so, um tað ber seg fíggjarliga.
*Mynd: Jan Müller*

Norrøna, sum nú eisini verður partur av hetlendska »gerandisdegnum«.
*Mynd: Jens K. Vang.*






# Fiskidagatalið má skerjast næsta ár

**Politiski myndugleikin hevur máað støðið undan fiskidagaskipanina og tí slepst ikki undan at skerja fiskidagatalið komandi ár og tað rakar ósekar fiskimenn, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevndini**

ØKT VEIÐITRÝST

*Áki Bertholdsen*

– Tað slepst ikki undan at skerja fiskidagatalið næsta ár.

Tað heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum.

Hann sigur, at soleiðis sum gongdin hevur verið seinastu árini, eigur tað at liggja okkum fjart at økja um veiðitrýstið á grunnarnar.

– Vit hava ein fiskiflota, sum er førur fyri at fiska stórar nøgdir, tá ið fiskur er, so tað eigur ikki at liggja frammaliga í politikkinum at økja trýstið enn meiri.

Men kortini er tað júst tað, sum her hent, seinastu tíðina, sigur Henrik Old.

Og hann heldur, at tað er landsstýrið, sum hevur stóran part av skyldini av at trýstið á fiskastovnarnar er økt og at tað sostatt verður neyðugt at skerja fiskidagatalið komnandi ár.

Tað, sum hann sipar til, eru alla tær ivasomu samanleggingar av fiskiloyvum, sum landsstýrið hevur givið loyvi til í seinastuni, og sum vit greiða frá í greinini um nýggja fiskimálaráðharran sum má byrja av nýggjum.

– Eftir tað, sum er hent, fer sakkunnleikin ikki at mæla okkum til at økja veiðitrýstið. Harafturat verður tað ómetaliga trupult at koma uttanum at trýstið á fiskastovnarnar er økt aftaná tær samanleggingar, sum eru gjørdar. Sostatt verður tilráðingin frá sakkunnleikanum uttan iva einaferð enn at vit skulu halda aftur og samanlagt verður tað tískil ringt at sleppa undan at skerja fiskidagatalið.

Formaðurin í vinnunevndini vísir á, at seinast var fiskidagatalið skert eitt prosent.

– Tað var ein rættiliga tilvildarlig skerjing og tað var mestsum bara fyri at kunna vísa á, at tilráðingin frá fiskifrøðingunum ikki heilt varð skúgvað til viks.

Henrik Old sigur, at tað er spell at slíkar ivasamar samanleggingar, sum tær ið eru gjørdar seinastu tíína, skulu vera orsøk til, at fiskidagatalið verður skert. Tað fer nevniliga at raka nógvar ósekar fiskimenn, sum hvørki eiga lodd ella deil í hesum samanleggingum, men sum kortini koma at bløða fyri tær.

– Sum skipanin nú er, eiga økingar í veiðitrýstinum at føra við sær, at fiskidagatalið verður skert. Men tað slepst ikki undan, at tað eisini verður skert hjá teimum, sum ikki hava økt sítt veiðitrýst og sostatt gerast teir ósek offur í tí, sum teir onga ávirkan hava á.

## Eina óhefta nevnd

Henrik Old heldur, at í longdini ber tað ikki til, at fiskidagatalið skal verða ásett so tilvildarliga, sum tað hevur verið talan um.

Tað er eisini ein sannroynd, at betri teknikkur í sær sjálvum ger eisini fiskiskipini alsamt effektivari.

Tí heldur hann at vit eiga at lata eina nevnd gera landsstýrinum óheft tilmæli um, hvussu farast skal fram í ymsum viðurskiftum.

Henrik Old sigur, at uppgávan hjá nevndini kann vera at rokna effektivitetin hjá fiskiflotanum út. Er effektiviteturin øktur í einum ári, eiga vit at fáa tað svart uppá hvítt, tí í løtuni er alt meiri og minni bygt metingar og ikki á nágreiniligar útrokningar.

– Tá ið nágreiniligar útrokningar eu til taks, ber eisini betri til at áseta fiskidagatalið og Henrik Old heldur, at tað eigur at verða dagført við jøvnum millumbilum.

– Tað er sigur eisini sjálvt, at tað er lagaligari fyri vinnuna at laga seg eftir umstøðunum, tá ið fiskidagatalið verður skert 1-2% við jøvnum millumbili, fyri at leggja upp fyri effektivitetshækkingum, heldur enn at noyðast at gera munandi skerjingar í einum høggi, tá ið fiskiskapurin brádliga fer í botn, tí tað kann gerast ein skelkur, ið vinnan ikki yvirlivir, sum tað hendi fyrst í nítiárunnum.

Men ábyrgdin hjá nevndini kann eisini vera at geva fiskimálaráðnum tilmæli um, hvussu lógin skal tulkast, tá ið umsóknir koma um ivasamar samanleggingar og onnur mál, sum ivi hevur verið sáddur um.

Henrik Old sigur, at fiskimálaráðið hevði skula havt ómetaliga góðar grundgevingar fyri at skúgva tilmælini hjá eini slíkari sakkønari nevnd til viks.

Hetta kundi verið fiskidaganevndin, men tað kundi eisini verið onkur annar. Men treytin er, at talan skal vera um eina nevnd, sum er 100% óheft av øllum politiskum áhugamálum og at talan er um vælkskikkað fólk, sum eisini føldi stóra ábyrgd mótvegis fiskidagaskipanini.

Formaðurin í vinnunevndini sigur, at einb partur av arbeiðnum hjá fiskidaganevndini er at hyggja eftir slíkum viðurskiftum, men hann heldur ikki, at nóg nógv verður gjørt við tann partin.




*– Eftir tað, sum landsstýrið hevur givið loyvi til í seinastuni, er ringt at koma uttanum, at veiðitrýstið er økt og sostatt sleppa vit ikki undan at skerja fiskidagatalið næsta ár, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevnd løgtingsins*